Vágatunnilin letur upp 10.desember

Leiðslan fyri P/F Vágatunnilin, NCC og danska felagið KB El-Teknik hava ásett 10.desember til dagin, tá Vágatunnilin skal takast í nýtslu. Greitt er, at P/F Vágatunnilin noyðist at gjalda donsku el-fyritøkuni 1,75 milliónir krónur afturat, fyri at fáa tunnilin lidnan til henda dato

Eftir fund í einum arbeiðsskúri við Leynar týsdagin, er greitt, at P/F Vágatunnilin skal gjalda el-fyritøkuni KB El-Teknik 1,75 milliónir krónur afturat upprunaliga tilboðinum fyri at gera arbeiðið liðugt, so tunnilin kann latast upp fyri ferðslu tann 10. desember

UNDIRSJÓVARTUNNIL
Jón Brian Hvidtfeldt

Eftir drúgvan fund í einum arbeiðsskúri í Leynum týsdagin og -kvøldið er nýggjur dagur ásettur fyri, nær Vágatunnilin kann lata upp. Stjórarnir fyri P/F Vágatunnilin, KB El-Teknik og NCC Vágakonsortiet boðaðu í felags tíðindaskrivi eftir fundin frá, at 10. desember verður dagurin, tá tunnilin verður opin fyri ferðslu.

Tað verður tó ikki ein heilt liðugur tunnil, sum letur upp tann 10. desember. Nakað av arbeiðinum verður kortini ikki liðugt, m.a. verða ljósmastrar við tunnilsmunnarnar og rundkoyringina ikki settar upp fyrr enn seinni. Harumframt ber ikki til at fáa fjarstýrdu og sjálvvirkandi bummarnir, sum skulu steingja tunnilin, um óhapp henda inni í tunnlinum, at virka til henda dato. Tí verður fyrstu tíðina neyðugt at hava fólk til arbeiðis uttanfyri tunnilin, sigur Dávid Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunnilin. Hann vísir á, at fyrstu tíðina koma nøkur fólk allíkavæl at vera til arbeiðis uttanfyri tunnilin, fyri at halda eyga við tí annars sjálvvirkandi bummskipanini, sum skal setast upp vágamegin.

Fyrstu tíðina eftir at undirsjóvartunnilin er latin upp fyri ferðslu, verður eisini neyðugt at stongja tunnilin um næturnar. Hetta er neyðugt, ti ymiskt skal monterast upp undir loftið, yvir koyribreytini inni í tunnlinum, og hetta kann ikki gerast, meðan ferðsla er. Talan er um útgerð, so til ber at hoyra útvarp og at nýta fartelefon inni í tunnlinum. Dávid Reinert Hansen sigur, at alt annað arbeiði, sum hevur við ljós og við trygd, t.d. neyðtelefonir, inni í tunnlinum, verður liðugt, og at tað tí ikki verður ótryggari at koyra ígjøgnum tunnilin, hóast alt arbeiði ikki verður liðugt.

Arbeiðið gerst dýrari

Síðan tað gjørdist greitt, at arbeiðið ikki fór at verða liðugt til tann 26. november, hevur tvístøða tikið seg upp millum P/F Vágatunnilin og donsku el-fyritøkuna KB El-Teknik um, hvør skal bera meirkostnaðin av, at arbeiðið er seinkað. Dávid Reinert Hansen sigur, at semjan millum partarnar, sum fekst í lag í arbeiðsskúrinum í Leynum týskvøldið, ber í sær, at P/F Vágatunnilin noyðist at gjalda 1,75 milliónir krónur afturat fyri at fáa el-arbeiðið gjørt.

– Tað er ikki óvanligt, at ávísar meirútreiðslur stinga seg upp, og sum sagt eru fortreytirnar broyttar síðan í summar, sigur Dávid Reinert Hansen. Hann metir tó ikki, at meirkostnaðurin fer at síggjast aftur í bummgjaldinum, sum leiðslan fyri P/F Vágatunnilin framvegis arbeiðir við at fáa ásett.

Samlaði kostnaðurin av Vágatunnlinum er ásettur til 240 milliónir krónur, og harumframt koma so prishækkingar umframt rentuútreiðslur í byggitíðini.

Bíligari tilbúgving

Dávid Reinert Hansen sigur, at P/F Vágatunnilin nú er samdur við kommunurnar við báðar tunnilsmunnar um tilbúgvingina í samband við Vágatunnilin. Leiðslan fyri P/F Vágatunnilin og kommunurnar hava verið ósamdar um, hvør skal bera kostnaðin av dýru bjargingarútgerðini, m.a. brandbilar, sum skal vera tøk báðu megin tunnilin. Dávid Reinert Hansen sigur, at semja er um í fyrstu atlogu at útvega bíligari útgerð enn upprunaliga mett, millum annan fyri P/F Vágatunnilin kundi havt havt lagt arbeiðið betur til rættis, so sleppast kundi undan verandi støðu, har felagið noyðist at gjalda 1,75 milliónir krónur afturat fyri at fáa el-arbeiðið gjørt.

– Tað er ikki óvanligt, at ávísar meirútreiðslur stinga seg upp, og sum sagt eru fortreytirnar broyttar síðan í summar, sigur Dávid Reinert Hansen. Hann metir tó ikki, at meirkostnaðurin fer at síggjast aftur í bummgjaldinum, sum leiðslan fyri P/F Vágatunnilin framvegis arbeiðir við at fáa ásett.

Samlaði kostnaðurin av Vágatunnlinum er ásettur til 240 milliónir krónur, og harumframt koma so prishækkingar umframt rentuútreiðslur í byggitíðini.

Bíligari tilbúgving

Dávid Reinert Hansen sigur, at P/F Vágatunnilin nú er samdur við kommunurnar við báðar tunnilsmunnar um tilbúgvingina í samband við Vágatunnilin. Leiðslan fyri P/F Vágatunnilin og kommunurnar hava verið ósamdar um, hvør skal bera kostnaðin av dýru bjargingarútgerðini, m.a. brandbilar, sum skal vera tøk báðu megin tunnilin. Dávid Reinert Hansen sigur, at semja er um í fyrstu atlogu at útvega bíligari útgerð enn upprunaliga mett, millum annan fyri P/F Vágatunnilin kundi havt havt lagt arbeiðið betur til rættis, so sleppast kundi undan verandi støðu, har felagið noyðist at gjalda 1,75 milliónir krónur afturat fyri at fáa el-arbeiðið gjørt.

– Tað er ikki óvanligt, at ávísar meirútreiðslur stinga seg upp, og sum sagt eru fortreytirnar broyttar síðan í summar, sigur Dávid Reinert Hansen. Hann metir tó ikki, at meirkostnaðurin fer at síggjast aftur í bummgjaldinum, sum leiðslan fyri P/F Vágatunnilin framvegis arbeiðir við at fáa ásett.

Samlaði kostnaðurin av Vágatunnlinum er ásettur til 240 milliónir krónur, og harumframt koma so prishækkingar umframt rentuútreiðslur í byggitíðini.

Føroyskir arbeiðsgevarar seta spurnartekin við KB El-Teknik

Vilhelm M. Johannesen, sum er formaður í bæði Handverksmeistarafelagnum og Arbeiðsgevarafelagnum, undrast á leiklutin, sum danska fyritøkan KB El-Teknik hevur fingið í Føroyum. Bæði at fyritøkan í fleiri førum hevur verið nógv bíligari enn føroysku kappingarneytarnir, og viðurskiftini kring løggildingina hjá fyritøkuni, sum er neyðug fyri at gera el-arbeiði í Føroyum

VINNULÍV
Jón Brian Hvidtfeldt

Formaðurin í felagnum hjá føroysku handverksmeistarunum, sum eisini er formaður fyri allar arbeiðsgevarar í landinum, setur nú spurnartekin við tann sentrala leiklut, sum danska entreprenørfyritøkan KB El-Teknik hevur fingið í føroyska vinnulívinum. Henda fyritøka hevur í løtuni alt el-arbeiði, bæði á Landssjúkrahúsinum og í Vágatunnlinum. Tvey stór almenn arbeiði fyri yvir 30 milliónir krónur. Harumframt hevur fyritøkan eisini staðið fyri el-arbeiðinum á Kollafjord Pelagic.

Vilhelm M. Johannesen spyr, hvussu danska fyritøkan kann verða blivin præ-kvalificerað fram um fleiri stórar, føroyskar fyritøkur, eftir at almennu arbeiðini eru boðin út. Hann spyr, hvørjar metingar og hvørji krøv eru sett til fyritøkuna, áðrenn hon hevur fingið hesi arbeiði at gera.

– Vit hava fleiri stórar fyritøkur í Føroyum. Hvussu ber tað til, at henda lítla, útlendska fyritøka skal kunna megna øll hesi stórarbeiði í senn, spyr Vilhelm M. Johannesen. Hann leggur afturat, at tað kann tykjast, sum um henda ávísa fyritøka fær framíhjárætt, verður favoriserað, fram um føroyskar fyritøkur. Vilhelm M. Johannesen vísir á, at leikluturin, sum KB El-Teknik hevur fingið í føroyskum vinnulívi, skapar ein misstemning millum aðrar í vinnuni.

Setur spurnartekin við løggilding

Vilhelm M. Johannesen setur spurnartekin við løggildingina hjá KB El-Teknik, sum annars er eitt krav fyri at sleppa at virka og arbeiða við el-installatiónum í Føroyum. Lógin ásetur, at ein persónur í leiðandi, fulltíðarstarvi í fyritøkuni, sum harumframt er búsitandi í Føroyum, skal hava løggildingina, og harvið eisini formligu ábyrgdina, um hendi. Sambært lógini er tað bara SEV, sum kann geva hesa løggilding. Vilhelm M. Johannesen undrast yvir, hvussu lætt verður farið um hesi krøv, tá tað kemur til KB El-Teknik. Hann vísir á, at viðurskiftini kring løggildingina hjá fyritøkuni tykjast rættuliga ógreið - millum annað hevur verið ført fram, at føroyingurin, sum hevur løggildingina og harvið formligu ábyrgdina av øllum arbeiðum hjá KB El-Teknik í landinum, sjálvur starvast á einum boriplatformi, fjart frá Føroyum.

Vísir skuldsetingunum aftur

Thorvald Gaardlykke, sum hevur løggildingina vegna KB El-Teknik, skilir ikki atfinningarnar móti sær og fyritøkuni, sum hann hevur starvast hjá síðsta hálva annan mánaðin.

Hann vísir á, at hann hevur sína útbúgving, og hevði harumframt fingið løggilding frá SEV, áðrenn hann fekk arbeiði hjá KB El-Teknik. Hann kom í samband við KB El-Teknik, tí at hann var undirveitari hjá donsku fyritøkuni í samband við byggingina á Landssjúkrahúsinum, og nakað seinni samdust partarnir um at hann skuldi fáa starv hjá fyritøkuni. Síðan varð hansara løggilding flutt yvir til KB El-Teknik.

– Við tað at mín løggilding liggur til grund fyri arbeiðunum hjá fyritøkuni, er tað sjálvsagt eg, sum havi ábyrgdina av arbeiðinum, og at krøvini verða uppfylt, sigur Thorleif Gaardlykke. Hann leggur afturat, at í lógini er einki krav um at ábyrgdarhavandi skal standa uppi yvir monnunum, meðan teir gera sítt arbeiði – tað ger eingin góðkendur el-innleggjari, sigur Thorleif Gaardlykke.

Hann hevur annars ikki stórvegis viðmerkingar til mongu atfinningarnar móti fyritøkuni KB El-Teknik, uttan at hann skilir tær ikki rættuliga. Og tíðindini um, at maðurin við løggildingini starvast á einum boriplatformi, kennir hann einki til.

– Eg kann bara siga tað, at eg havi ongantíð so mikið sum verið á einum boripalli, og annars havi eg arbeitt í Havn síðsta hálva annað árið, sigur Thorleif Gaardlykke.

Myndugleikin eigur ikki at liggja hjá SEV

Formaðurin í Handverksmeistarafelagnum og Arbeiðsgevarafelagnum, Vilhelm M. Johannesen dugir ikki at siga, hvørt krøvini fyri at fáa løggilding, millum annað hjá útlendskum fyritøkum, sum koma hendavegin at arbeiða, eru nóg hørð, ella møguliga eiga at broytast. Hann heldur tó, at tað er óheppið, at myndugleikin, sum útskrivar løggildingina av el-innleggjarum, liggur hjá SEV. Eftir hansara tykki hevði verið rættast, um ein sjálvstøðugur stovnur stóð fyri hesum arbeiði.

Í seinastuni hevur fleiri ferðir verið sett spurnartekin við, hvørt tað er óheppið, at tað er stjórin fyri SEV, sum skrivar undir allar løggildingar, millum annað til føroyska el-inleggjaran hjá KB El-Teknik, samtíðis sum SEV-stjórin er nevndarformaður í P/F Vágatunnilin. Hesin gegnisspurningur ger tað bara alt meira neyðugt at loysa myndugleikan at útskriva løggildingar frá SEV, og flyta hann yvir í ein sjálvstøðugan stovn, heldur Vilhelm M. Johannesen.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa orðið á Knud Balle, stjóra í KB El-Teknik, til blaðið í dag.

Stovnan av brúkarafelag

Í gjárskvøldið var stovnandi fundur fyri føroyskum brúkarafelag. Í løtuni er einki brúkarafelag í Føroyum. Hetta meta stigtakararnir vera til stóran ampa fyri brúkaran

BRÚKARAFELAG
Rúna Sivertsen

Tá tað ræður um at verja og tryggja rættindi brúkarans, eru vit illa stødd.

Í Føroyum er eingin myndugleiki, ið varar av ella kærir seg um brúkaraviðurskifti.

Hetta vistu vit frammanundan, men tað kom pínliga í ljósmála, tá Norðurlendska Brúkaranevndin hevði sín ársfund í Føroyum um miðjan september.

Hetta er ein av orsøkunum til, at tey trý, Hans Pauli Strøm, Ingunn Simonsen og Gunnleivur Dalsgarð, tóku stig til aftur at stovna eitt brúkarafelag her hjá okkum.

Brúkarafelagið, sum varð stovnað í 1972 og virkaði í 20 ár, datt niðurfyri orsaka av ov stórari arbeiðsbyrðu.

Elsa Maria í Beiti, krambakvinna í Telebúðini í Klaksvík, sigur, at eitt brúkarafelag eftir hennara tykki, avgjørt hevði komið bæði keypara og seljara til góðar

- Vit ætla ikki at blása lív í gamla felagið, men byrja av nýggjum við øðrvísi uppgávum, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann sigur, at høvuðsendamálið er at geva føroyska brúkarnum eina rødd.

Hann vísir m.a. á, at Føroya Løgting ongan hevur at kalla inn í løgtingsnevndirnar, tá mál eru, sum snúgva seg um viðurskiftini hjá brúkarunum.

Á stovnandi fundinum høvdu bæði einstaklingar og feløg møguleika at tekna seg sum lim í felagnum.

Tey, ið hava áhuga í nýggja brúkarafelagnum eru vælkomin at venda venda sær til ein av stigtakarunum, sigur Hans Pauli Strøm at enda.

Nýggjur býlingur í Klaksvík

Ovast til vinstru í myndini sæst nýggja útstykkingin á Helnabrekku. Nýggi býlingurin hevur fingið navnið, á Grashjalla

Tey, sum hava fingið grundøki omanfyri Helnabrekku í Klaksvík, fara at búgva á Grashjalla. Tað samtykti býráðið á almenna býráðsfundinum í farnu viku

BÝRÁÐSFUNDUR
Rúna Sivertsen

Tey 24 grundøkini á Grashjalla eru øll seld, skjeytini eru útskrivaði, og byggiloyvini verða givin fyrsta dagin, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í samrøðu við Sosialin.

Tørvurin á grundøkjum og bústøðum í Klaksvík er stórur. Í næstum fer kommunan at gera klárt fyri 14 grundøkjum aftrat norðan fyri verandi útstykking.

Biðirøðinar eru langar, og enn hevur kommunan 80 umsóknir um grundøki liggjandi.

- Í løtuni arbeiða vit við eini ætlan um alternativa bygging á einum øki undir Helnabrekku, sigur borgarstjórin.

Hann sigur, at kommunan hevur fingið 4 rættiliga áhugaverd tilboð uppá hesa ætlan.

- Men enn vita vit ikki, hvørjum tilboði vit taka av, tí vit verða noydd at hugsa um bæði umhvørvi, trivna og kostna hjá keyparunum, sigur Steinbjørn.

Í samband við íbúðarneyðina, sum sanniliga eisini merkist í Klaksvík, sigur borgarstjórin, Steinbjørn Jacobsen:

- Tá eldraíbúðirnar á Kráarbrekku verða tiknar í nýtslu, fer tað sjálvsagt at gera, at nøkur hús verða tøk til sølu.

- Við hesum fara vit at kunna minka munandi um biðirøðina eftir grundøki í Klaksvík. Men enn er nakað eftir á mál, tí dagliga fáa vit umsóknir eftir grundøki, sigur borgarstjórin at enda.

SEV og BP í samstarv um vindorku

ORKA
Jan Müller

Orkufelagið SEV og bretska oljufelagið BP hava gjørt avtalu um at kanna møguleikan fyri at samskipa vindorku við verandi vatnorkuverkið hjá SEV í Vestmanna. Serstakliga er hugsað um Mýruverkið, har hæddarmunurin millum brunnarnar er umleið 240 metrar. Málið er m.a. at kanna orku- og figgjarligu úrslitini av eini skipan, har vindmyllur framleiða streym til pumpur, ið pumpa vatn úr tí niðara brunninum upp í tann ovara.

Hetta upplýsa felogini í skrivi.

Í skrivinum verður víst á, at áhugin fyri øðrum orkukeldum enn termiskari orku er støðugt vaksandi um allan heim. Hetta ikki minst orsakað av tí vaksandi ansinum fyri teimum árinum, ið dálking er mett at hava á verðurlag og umhvørvi. Ein av teimum alternativu orkukeldum, ið hevur stóran áhuga, er vindorka. Tey framstig, ið seinastu árini eru gjørd innan hesa orkukeldu, hava vakt stóran ans. Langt er tó enn á mál, áðrenn vindorka verður ein týðandi og álitandi partur av orkutilfeinginum.

Sum liður í kanningunum av vindmyllumøguleikunum í Føroyum setti SEV eina vindmyllu upp í Neshaga í 1993. Tað er ein 150 kW mylla, sum stendur í 130 metra hædd. Øll framleiðsalan frá vindmylluni verður latin inn á 20 kV netið hjá SEV.

SEV og BP siga víðari í tíðindaskrivinum, at bretska ráðgevingarfelagið Garrad Hassan, sum eru serfrøðingar í vindorku, verður knýtt at omanfyri nevndu kanningini, sum annars byggir á vitanina og royndirnar hjá SEV frá bygging og rakstri av orkuverkum í Føroyum.

SEV sær tað sum ein áhugaverdan part av kanningini at fáa betri fatan av møguleikunum og útreiðslunum av eini tílíkari orkuskipan, umframt eisini at fáa størri vitan um vindorkuframleiðslu frá serfrøðingum, ið hava altjóða royndir á hesum øki.

Ætlanin er, at kanningin skal verða liðug í januar 2003. Eru fortreytirnar tá til staðar, fer SEV at umhugsa íløgur í eina tílíka skipan til frama fyri føroyska el-brúkaran.

Oljumálaráðið hevur játtað, at peningur av teirri upphædd, ið BP játtaði til førleikamenning í sambandi við fyrsta loyvisumfar, kann nýtast til hesa verkætlan verður sagt.

BP Exploration er sera fegið um at fáa høvið til at nýta pening til eina so áhugaverda kanning. Vindorkuserfrøðingar hjá BP luttaka eisini í verkætlanararbeiðinum.